# Klaksvíkingar í stórbýnum

Í fleiri ár hevur lokalblaðið í Norðoyggjum, Norðlýsið skipað fyri ferðum til London. Túrarnir eru gjørdir í samstarvi millum blaðið, Atlantsflog og Alex Sólstein sum vitugan og væl orðaðan ferðaleiðara.




*Ferðirnar hjá Norðlýsinum, saman við Atlantsflogi og Alexi Sólstein hava verið sera væl umtóktar*

Allir hesir túrarnir hava, eftir tí sum blaðið hevur sagt frá, verið sera væleydnaðir. Eftir túrin á páskum 2010 skrivar Oliver Joensen, blaðstjóri m.a. soleiðis í blaðnum 9. apríl í fjør:

"Annars gekk alt sum ætlað, og vit fingu ein góðan túr.

Skal eg nevna nakað, so skerst ikki burtur, at tað er sera hugnaligt at sita saman við føroyingum eftir loknan dag, og tosa og vísa fram, tað ein hevur upplivað um dagin.

Serstakliga er Alex Sólstein eitt unikum við síni vitan um Ongland, enska søgu, og ikki minst um føroyskar skemtisøgur.

Í fjør royndu vit ein túr til London, París og aftur London. Tann túrurin var eisini væleydnaður, ja, hann eydnaðist so væl, at vit hava hug at royna hann aftur í ár saman við Alex Sólstein", skrivaði altso Oliver Joensen í Norðlýsinum í fjør.

Myndirnar á síðuni eru somuleiðis tiknar av heimasíðuni hjá Norðlýsinum.


## LÆRLINGUR

### TIL NOA NOA Í TÓRSHAVN

Noa Noa søknast eftir einum ágrýtnum og sjálvstøðugum lærlingi, ið kundi hugsað sær útbúgving innan okkara spennandi yrki. Ert tú ein útatvendur persónur ið dámar væl móta og at verða kreativ/ur er hettar rætt starv fyri teg.

**Okkurt um teg:**

- Fyri at fáa lærupláss innan hettar yrki mást tú hava handilsskúla (FHS).
- Vit vænta av tær at tú ert ágrýtin og sjálvstøðug/ur.
- Hevur hug at arbeiða við móta og ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum:**

- Vit bjóða eitt starv í einum nýtímans handli, ið leggur stóran dent á, at mótin og tænastan eru í hásæti.
- Arbeiðsviðurskiftini eru góð við fjølbroyttari arbeiðsgongd.
- Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd innan hettar yrki!

**Umsókn:**

- Um hettar freistar teg so send okkum eina stuttoraða lýsing av tær.
- Freistin fyri at senda umsókn inn er 30. maj 2011.
- Vit gleða okkum at hoyra frá tær og bíða gjarna eftir tí rætta.

NOA NOA®

Niels Finsensgøta 11
Boks 271
110 Tórshavn
Tlf. 281706

